


# Góði lesari

**Sosialurin er nú til reiðar at bjóða nýggju tíðini av. Vit fara at broyta talið á útgávudøgum, og blaðið sjálvt verður eisini broytt – bæði tá tað kemur til útsjónd og innihald. Hesar broytingar koma at ávirka bæði tykkum lesarum og okkum, sum starvast á blaðnum.**

**Frá 1. apríl at rokna kemur Sosialurin út tríggjar ferðir um vikuna – mánadag, mikudag og fríggjadag. Hendan broytingin verður gjørd fyri at fáa eitt blað, sum passar betur til tíðina, vit liva í.**

**Gongdin í Føroyum og aðrastaðni vísir, at bløðini hava trupult við at standa seg í kappingini um tíðindini. Skjótu miðlarnir – internet og radio – standa sterkir í kappingini um nógvar av tíðindasøgunum, og tí má avísin nú flyta seg og finna fótafestið aftur. Og tað ger Sosialurin nú. Fyri 20 árum síðani fór Sosialurin undir at geva blaðið út fimm ferðir um vikuna, men nú er tíðin komin at minka útgávudagarnar niður í tríggjar útgávudagar um vikuna og gera eitt nýtt blað til føroyingar.**

**Nýggi Sosialurin kemur fyrstu ferð á gøtuna 6. mars. Hetta verður ein týsdag og kemst av, at mánadagur 5. apríl er annar páskadagur. Eftir tað verða útgávudagarnar mánadag, mikudag og fríggjadag, um ikki serligar umstøður gera seg galdandi.**

**Tíðindavirksemið í Miðlahúsinum verður ikki niðurraðfest fyri tað, tí Miðlahúsið røkir tíðindaflutning døgnið runt á Portalinum og um dagin á Rás2. Sosialurin skal frameftir verða blaðið, sum finnur sín egna stíl og leiklut við tíðindum, kjaki, bakgrund, reportasjum, ummælum, samrøðum og annað.**

**Lækkingin í talinum á útgávum merkir eisini, at haldaragjaldið lækkar. Frameftir fer Sosialurin at kosta 400 krónur um ársfjórðingin. Haldarar okkara hava longu goldið fyri apríl-ársfjórðingin, men tað, tey hava goldið ov nógv, verður drigið av gjaldinum fyri juli-ársfjórðingin. Tey, sum hava árshald, verður eisini góðskrivað fyri lækkingina í haldaragjaldinum.**

**Vit gleða okkum sera nógv til at bjóða tykkum ein nýggjan Sosialin, sum vit vóna tit verða glað fyri, og sum føroyska samfelagið í breiðari merking eisini fær gleði av.**

***Eirikur Lindenskov,***
***ábyrgdarblaðstjóri***




## SKRIVSTOVUFÓLK

til koyrikortdeildina

**Atkstovan søkir eftir skrivstovufólki til Koyrikortdeildina at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt fulltíðarstarv**

UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella tílíkari útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu.

Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi og dugir at arbeiða undir trýsti. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Innlendismálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara, á telefon 350 418.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **29. mars 2010.**

*Akstovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo